Havstovan fingið ein

# BETRI GLUGGA

HEIMASÍÐAN: Við heimasíðuni www.hav.fo í nýggjum sniði er nú bæði lættari og skjótari hjá øllum føroyingum at finna fram upplýsingar um fjølbroytta virksemið á Havstovuni.



**Ebba Mortensen**
verkfrøðingur

Hvat ger havrannsóknarskipið Magnus Heinason beint nú? Hvat siga tær nýggjastu kanningarnar um makrelin? Hvat var tað nú Havstovan segði um veiðutrýstið á toskastovnin við Føroyar?

Spurningarnir, sum føroyingar – leikfólk sum serfrøðingar – hava um Havstovuna kunnu vera mangir og ymiskir, og nú er lættari enn nakrantíð at finna rætta svarið fram sjálv/ur.

1. mars 2012 fekk heimasíðan hjá Havstovnuni, www.hav.fo nýggjan ham. Og við hesum fær brúkarin uppaftur betri innlit í alt tað, sum fyriferst á Havstovuni.

**Bæði praktiskt og vísindaligt**

Dentur er lagdur á, at heimasíðan skal vera kunnandi og løtt at finna runt í.

Á forsíðuni síggjast nýggjastu tíðindini og leinkjur til ávís evni. Har kanst tú t.d. lesa hvat tú gert, um tú finnur ein merktan fisk. Tú sært hvar Magnus Heinason er staddur í løtuni. Og ovarliga á síðuni finnur tú bjálkar, sum leiða teg til faklig og umsitingarlig viðurskifti.

**Við hesum fær brúkarin uppaftur betri innlit í alt tað, sum fyriferst á Havstovuni**

Á síðuni “Gransking og kunning“ finnur tú t.d. tey evnir, sum fólk á Havstovuni granska í. Eisini verða verkætlanir lýstar, har fólk á stovninum luttaka.

Granskingarúrslit verða harumframt kunngjørd í ritgerðum og við tíðindum, sum javnan verða løgd út á síðuna.

Havstovan skal á hvørjum ári innan 15. juni lata landsstýrinum tilráðing um veiðutrýstið komandi fiskiár. Tilmælini síðstu árini eru at finna á síðuni „Ráðgeving“.

Her finnur tú eisini tilmælini frá altjóða havgranskingarstovninum ICES fyri teir fiskastovnar, sum hava áhuga fyri føroysk fiskiskip.

„Magnus Heinason“ hevur fingið sítt egna pláss á hav.fo. Har kanst tú lesa um okkara havrannsóknarskip, hvørjar kanningartúrar ætlanin er at gera og frágreiðingar frá túrum, sum hava verið.

**Partur av nýggjum samleika**

Tað er ikki av tilvild, at Havstovan hevur fingið sær ein betri glugga út í heim.

Á vári 2009 fekk táverandi Fiskirannsóknarstovan nýggjan samleika. Stovnurin fekk nýggja navnið Havstovan og nýtt búmerki. Og sum partur av nýggja samleikanum hevur




heimasíðan nú eisini fingið nýtt snið.

At kunna um úrslit og granskingina á Havstovuni er alneyðugt og eitt av aðalmálunum hjá Havstovuni. Og ein tann skjótasti mátin at veita hesa kunning er gjøgnum internetið.

Tí hevur arbeiðið við einari nýggjari heimasíðu verið raðfest frammarlaga og 1. mars 2012 kundu vit loksins vísa www.hav.fo í nýggjum hami.

## KREA sniðgav

Tað er lýsingarfyritøkan KREA úr Runavík, sum hevur sniðgivið nýggju heimasíðuna hjá Havstovuni. Tað var eisini KREA, sum í 2009 sniðgav nýggja samleikan hjá Havstovuni.

Eitt stórt framstig við nýggju heimasíðuni er, at tað er møguligt at menna hana víðari, so hon støðugt gerst meira spennandi og áhugaverd.